# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Daniel Peter Næs 90 ár 16. november

Hósdagin 16. november fyllir Daniel Peter Næs í Nesi í Hvalba 90 ár.

Dánial er elstur av børnunum hjá Poul og Atu (f. Simonsen úr Sandavági), sum búðu undir Lítahamri í Nesi, Hvalba. Foreldrini bæði náddu høgan aldur, Poul bleiv 100 ára gamal og Ata bleiv 91 ára gomul.

Dánial giftist í 1949 við Kirsten, sum er ættað úr Ribe. Tey búsettust í Nesi og fingu tey fýra børn, Poul Laust (doyði av sjúku í 1970, bert 19 ára gamal), Margrethe sum býr á Argjum, Mona sum býr í Hvalba, og Linda sum býr í Keypmannahavn. Abbabørnini eru 6 og langabbabørnini eru 5.

Dánial var við sluppini "Ørvingurin" í 1932 og 1933 í Grønlandi. Ørvingurin hevði onki stýrihús, hevði tó ein 40 hesta motor. Var eisini til fiskiskap við sluppunum "Falkurin", "Vestmanna" og "Frida".

Dánial tók stýrimansprógv á Torshavn Navigationsskole í 1941.

Tá ið Lincoln City bleiv bumbað og sakk á Havnarvág, var Dánial ein teirra, sum í skundi drógu bát, fyri at fara út at bjarga manningini.

Hann sigldi nakað undir krígnum við sluppini "Borglýn" úr Trongisvági.

Restina av krígnum arbeiddi hann í kolinum.

Var við trolaranum Drátti og Vágs sluppini City fram til 1950. Var so í nøkur ár við kolabátinum Skarvasteini. Síðani við línubátinum Ranafossi og trolaranum Leivur Øssursson.

Í 1975 fór Dánial út at sigla við Copenhagen Reefer. Hann gavst at sigla í 1986, næstan 70 ára gamal.

Dániel sat í bygdaráðnum í Hvalba í 8 ár.



## Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 70 ára føðingardegnum 9. aug. 06

Takk fyri gávur, blómur, talur, sangir, fjarrit og uppringingar.

Tøkk til tykkum, sum hildu dagin saman við mær.

Harrin signi tykkum øll.

Heilsan
Lea Juul, Søldarfirði

**Dagurin**

**15. november. Leopold**, deyður í 1136. Greivi í Eysturríki, sum varð skírdur halgimenni fyri mongu góðgerðir sínar og fyri tær kirkjur og kleystur hann læt byggja. Hann umkomst á eini veiðuferð. Navnið kemur av týska orðinum fyri fólk og djarvur.

Laura Poulsen, Hoyvík:

# 30 ára starvsdag á Føroya Barnaheimi





*Laura Poulsen*

*Á myndini er Laura saman við starvsfólkunum á Føroya Barnaheimi.*
*Aftara rað f.v.: Rannvá Jacobsen, Sólvá Jacobsen, Tine Lyager, Ingunn Ejdesgaard, Karina V. Jensen, Ingi Hansen, Egil Rasmussen, Kristvør Hentze (reingerðarfólk), Durita Petersen, Torgerð Dam, Gitte Samuelsen, og Brynhild M. Joensen (deildarleiðari á Familjudeildini).*
*Fremst f.v.: Marita G. Hansen, Djóni N. Joensen (deildarleiðari á Ungdómsdeildini), Laura Poulsen, Beinta Johannesen (leiðari á Føroya Barnaheimi), og Frida J. Dam.*
*Elith Hammer (húsavørður), Annika R. Olsen (skrivstovufólk) og Elsa Vest vanta á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 10. november var móttøka á Føroya Barnaheimi í sambandi við at Laura Poulsen hevði arbeitt á stovninun í 30 ár.

Laura, sum er ættað úr Klaksvík, byrjaði at arbeiða á Barnaheiminum í 70-unum, áðrenn hon fór til Danmarkar at lesa til pedagog. Eftir lokna útbúgving kom hon aftur á Barnaheimið at arbeiða.

Barnaheimið er býtt upp í Familju - og Ungdómsdeild, og Laura hevur seinastu árini arbeitt á Ungdómsdeildini. Av núverandi starvsfólkunum er Laura tann sum hevur verið longst á stovninum.